TING-HELLAN

# So til helvitis!

**Agga Niclasen**
*attitude@niclasen.fsnet.co.uk*



Á denn fransósuta, neyðarsliga nátt. Hvørja ferð Breckmann verður valdur kanst tú í minsta lagi trampa í kring í húsinum og plikta teg at rýma av landinum; men tað riggar ikki, tá ið valið er handan Atlantarahavið, í Amerika... við tað at a) Eg eri ikki í landinum og b) Hvar enn tú fert, stýra teir kortini staðin.

Og nú, meira enn ein mánað aftan á valið, ivist eg enn í um ymisháttaðu ‘klisjeirnar’ frá amerikanska forsetavalinum og sjálvum valkvøldinum nakrantíð fara at helma í við at duna ígjøgnum høvdið: »Wrong war, wrong place, wrong time...«; »Freedom is on the march... [sic]«; »Passing a global test...«; »That’s how it looks at the moment...« og, ikki at gloyma, »Too close to call...« Eg eri enntá byrjaður at møsna tær í svøvni.

Men, til valnáttina. Ta einu ferðina, í eini svøvntungari løtu klokkan fimm um morgunin og vinstra Bruno Pitti-inniskógvinum framvegis, akkurát-hangandi á fótinum, hugdi eg upp og sá Bush og stórfamiljuna sita saman og smílast býttisliga á BBC World. Hetta átti verið ólógligt. Í minsta lagi væntaði eg at hoyra hasa plágandi røddina, »Some viewers might find the following scenes distressing« ella »The images you’re about to see could cause epilepsy«. Men gakk, eingin ávaring!

Tó so — hvat val av rásum viðvíkur. Tí, nakað áðrenn, og áðrenn vit roynveruliga vistu, at fýra ár afturat við nýkristiliga, smírandi George W. Bush var ein ófrávíkiligur realitetur, vitjaði eg (umframt ókristiligani vánaligu valsendingina hjá DR1) CNN. Har vísti ein av teim óteljandi samfelags-serfrøðisligu orakkulunum okkum tveir listar, »Bush« og »Kerry«, við státunum, teir høvdu vunnið, undir nøvnunum. »Soleiðis sær tað út í løtuni«, segði serfrøðisliga oraklið, »men hygg hvussu øðrvísi tað hevði verið, um Kerry vinnur Florida«... og so skrivaði hann »Florida« undir navnið hjá endaliga taparanum. Upptøkutólið amaðist upp á nýskrivaða orðið — løtan var so langdrigin at tað eydnaðist mær at fara eina rás upp, BBC World, og niður aftur, áðrenn frágreiðandi myndin var søga — og so boðaði nærlagdi samfelagsfrøðingurin frá »Now back to the studio«.

Á BBC World dansaði Peter Snow, enskur telduguru, sum svakur á einum risaligum amerikukorti framman fyri eina falska plenu tilhoyrandi Hvítu Húsini. »Um allir státirnir fara sama veg sum síðstu ferð«, segði hann, »er *hetta* hvat vit kunna vænta fer at henda«. Nøkur tøl spelaðu hvør sín veg og so segði hann: »Og *tað* merkir ein sigur fyri George Bush«. Jú men, sjálvandi vil tað tað! Líka so væl sum høvdu allir státirnir farið sama veg sum í 1860 hevði tað valdað ein sigur fyri Abraham Lincoln.

Kortini— eg veit ikki hví — sat eg í hvíldarstólinum alla ta somlu náttina, í pínu, ómentur at stoppa hóast eg visti, tað var skeivt; gripin av somu noyðsluni at skaða seg sjálvan ið kann noyða teg at eta ein heilan pakka av Bastogne-smákøkum ella hugsa um hvussu leingi tað nú hevði tikið Eivør Pálsdóttir at borið fram *ein* áhugaverdan setning — ups, nú verði eg vist vístur úr landi.

Áh, kom nú! Eg kann ikki vera einsamallur um hetta. Nei, ikki at áh so forbiið »fosturlandskæra«, men sjarmerandi, frú Pálsdóttir er yvirmett, men at tú onkuntíð bara hyggur at onkrum, tú hatar, sum úrslit av eini sjónvarpsligari masokismu-útgávu—tí at tú vilt skaða teg. Onkuntíð, sum ta náttina, hyggur tú sum gandaður, av andstyggiligari ræðslu. Hava vit veruliga avmarkað okkum til *hetta*?

Og lívssøri atburðurin hjá demokratunum ta nátt ina gjørdi bara ilt verri: hvørja ferð enn eitt vánaligt úrslit kom fram, bjóðaðu framsøgufólkini hjá Kerry tíðindunum vælkomnum við hasum ótolandi álvarsama nikkinum, »teir altavgerandi ‘sving’-státirnir eru enn ikki avgjørdir«. Hví kunna tey ikki bara vera menniskjaslig og skrála: »Áh, so til helvitis! Vit taptu Florida... enn einaferð«.

John Edwards, sum var fyri Kerry sum friðarbløkan John Lennon enn er fyri føroyskan tilverurætt, borðreiddi við einum sjúkligum gríni og onkrum møsni um at bíða ein dag afturat. Heldur átti hann kunngjørt: »Kæru landsmenn... *hetta er ikki rættvíst*. Hann, hatta »nýkristiliga« neytið, hevur einsamallur syrgt fyri at milliónir eru farin frá at vera fátøk til ørfátøk—og tað vildi jú verið á leið líka høpisleyst at funnið f****** ‘brilliansuna’ í sangbólkinum Salt sum »tað kristna« ið smírandi at trampa á fólk, frammanundan illa fyri. Nýkristiliga neytið hevur syrgt fyri einum trillión-dollara fíggjarhalli við at reka út av lagi vánaligt *reaganomics*. Við sama neyti, kæru landsmenn, skula vit leita tíggjuáraskeið aftur fyri at vera á leið líka so langt burtur frá eini almennari sjúkratrygging sum í dag; nýkristilingurin fær Bjarta Mohr at sýnast orðkringan og, hvussu er og ikki, so eru Michael Stipe, *The Independent*, Public Enemy og Springsteen í parti við okkum, meðani Bush hevur Jørn Nielsen, *Råb Op!*, Salt og *Frasier*, og soleiðis er tað, *so skít*!«

Úrslitið greiður millum annað frá hvussu nyttuleyst tað var av neytinum Kerry at sýnast góðtakiligur fyri »teimum í miðjuni«. Sambært eini skoðanarkanning vóru 90 prosent av teimum, ið atkvøddu fyri Demokratunum, longu ímóti kríggnum í Irak; ímeðan ein uppaftur størri prosentpartur av teimum, ið atkvøddu fyri Republikanunum—uttan fyrilit og uttan at royna hinar meira fruktagóðu møguleikarnar—longu stuðlaðu tí. (Hetta, tí svaklingar sum Rice, Powell og Rumsfeld megnaðu, heilt ótrúligt, at yvirtala annanhvønn amerikanskan veljara, at lorturin Hussein stuðlaði lortinum bin Laden — eg brúki sjálvandi vendingina »heilt ótrúligt« vegna tí sannroynd, at lortarnir báðir hataðu hvønn annan.)

So hjá Kerry at royna og sannføra krígsstuðlarnar, at hann hevði gjørt tað betri, var altíð eitt vónleyst tiltak; serliga lyftið um at »stjórna kríggnum á rættan hátt við at savna saman okkara vinir«. Tí eyðsýndi spurningurin er »og hvat so?« Og til tað kundi hann passandi svarað: »Jú, so kunna vit øll sessast og fáa okkum ein deiligan urtatemunn. Har finst nevniliga ikki tann trupulleiki, sum ikki kann fiksast um ein góðan temunn í songini og *Imagine* sum áeggjandi baktónleikur«.

Stórsligna triksið hjá Bush hevur verið at verða afturvaldur sum maðurin førur fyri at rudda upp í óneyðuga hurlivasanum. Tað er sum hasin elektrikarin, ið mælti: »Áh dú, áh dú! Hann sjálvur, tú mást altso orsaka, men tað sær ikki mætari út enn at eg havi sprongt húsini hjá tær í luftina... ja, haryviri liggur so, ja, eg veit ikki, um tú sært hana fyri øllum leidningunum — beint við síðuna av komfýrinum, undir dupultsongini!—nei... hm!... ... men har liggur so frúan. Men, lat tað fara og lat meg fortelja tær hvør er tann einasti at fáa skil á hesum hurlivasanum fyri teg — eg«.

So, bara tí vit muga góðtaka úrslitið, merkir tað ikki at vit eisini skula góðtaka allar avleiðingarnar av tí. Til dømis vildi tað—aftaná at Bush var farin undir enn eitt fullgjørt álop á Fallujah — verið eirindaleyst at sagt við eina familju í býnum: »Jú, eg eri væl varugur við at tit drýpa høvur, men vit høvdu eitt val herfyri... so at mótmæla at grannalagið hjá tær og familjuni verður sorlað, vildi verið at mata burturundan fólkaræðisligu gongdini, og — hvat verri er — tað vildi verið anti-amerikanskt, og tað vilja tit ikki vera, anti-amerikansk. So, samanumtikið, takið tykkum saman og roynið ikki at vera rakt av krússararakettunum í fýra ár; og um nøkur tykkara framvegis eru á lívi tá, íðan, ja, hvør veit, kanska verður valúrslitið øðrvísi tá?«

Hugburðurin hjá George Bush, »á skít, legg ikki í at telja, sovorðið nakað ger ikki annað enn at seinka øllum!«, tykist annars vera óbroyttur. Tað vil siga, at hóast John Kerry hevði vunnið hvønn tann einasta stát, hevði hann framvegis ikki verið forseti. Tí mótstøðumaðurin hevði so spakuliga spákað eftir svalanum og inn á plenuna aftanfyri Hvítu Húsini og kunngjørt: »Nýggj regla—best av trimum«.

# Teitur konsert á DVD

KONSERT

*Niels Uni Dam*

Stóra konsertin hjá Teiti leygarkvøldið í Vega varð fest á sjónband. Upptøkurnar skulu brúkast á eini konsert DVD, sum væntandi verður útgivin í vár. Í næstum verður farið undir at hyggja upptøkurnar ígjøgnum. Síðan verður endaligt avgerð tikin um, hvussu farast skal víðari við framleiðsluni.

Karmurin var frálíkur til upptøkuna. Hølini vóru á tremur av vælnøgdum áhoyrarum, sum klappaðu og sungu við, tá tað sømdi seg, men sum mest av øllum lurtaðu bergtikin. Hugnaligu hølini, ið plagdu at vera Folkets Hus, rúma út ímóti 1500 fólkum, og øll atgongumerkini vórðu seld.

Áðrenn Teitur fór á pallin, hitaðu svenski Tobias Frøberg og donsku Hush áhoyrararnar væl upp. Konsertin var hugnalig og ótrúliga innilig, og sambandið millum áhoyrarar og Teit var framúr.

Nakrir hundrað av áskoðarunum vóru føroyingar, men nógv teir flestu vóru danir, hetta staðfestir enn einaferð, at Teitur er vorðin eitt kent navn eisini uttan fyri Føroyar.



Les frásøgn úr Vega í mikudagsblaðnum.

*Hølini vóru á tremur av vælnøgdum áhoyrarum, tá Teitur Lassen trein á pallin í Vega leygarkvøldið*

*Mynd: Niels Uni Dam*